# Byggingin við Stórutjørn kann byrja

**Á býráðsfundi í Havn hóskvøldi fekk P/F Jákup á Dul prinsipiella tilsøgn at byrja arbeiði uppi við Stórutjørn. Nú manglar bert endaliga loyvi frá búnaðarstovuni, áðrenn arbeiði kann byrja**

STÓRATJØRN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Á býráðsfundi hóskvøldið fekk P/F Jákup á Dul prinsipiella tilsøgn til byggiætlanina við Stórutjørn. Nú vantar bert loyvi frá Búnaðarstovuni at keypa lendið, áðrenn arbeiðið kann fara í gongd*

Tórshavnar býrað samtykti á býráðsfundi hósdagin at geva P/F Jákup á Dul prinsipiella tilsøgn at byrja arbeiði við Stórutjørn. Við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti var stór semja í býráðnum fyri byggiætlanini hjá Jákupi á Dul.

### Býráðið vil ikki gera bindingar

Sjálvt um Tórshavnar býráð hevur samtykt at geva Jákup á Dul prinsipiella tilsøgn at byrja arbeiði, so vildu tey ikki gera nakra bindandi avtalu við P/F Jákup á Dul í samband við ítróttarøkið.

Jákup á Dul hevði sligið upp, at Tórshavnar býráð kundi leiga seg inn á ítróttarøkið fyri á leið 20 mió. árliga yvir eitt ávíst áramál, men hetta vildi býráðið ikki binda seg til. Teir meta tað vera bíligari í longdini at byggja eitt ítróttarøkið sjálvir.

Jákup á Dul er í feriu í løtuni, so sosialurin hevur ikki havt møguleika at fáa viðmerkingar frá honum, hvørt hetta fer at geva nakrar trupulleikar, ella um P/F Jákup á Dul ætlar at halda fram við somu ætlan.

### Loyvi væntar frá Búnaðarstovuni

Einasta loyvi, sum nú manglar, eftir at P/F Jákup á Dul hósdagin fekk prinsipiella tilsøgn til økið við Stórutjørn, er loyvi frá Búnaðarstovuni til byggilendið, sum ætlandi skal vera á leið 470.000 m2 til støddar.

Avtala skal gerast um, hvussu stórt økið skal vera, og hvussu høgur prísurin skal vera fyri lendið. Sum skilst verður hetta ikki ein trupulleiki, men tað er meir ein spurningur um tíð, áðrenn hetta kemur í rætt lag.

### Klárt at fara í gongd við arbeiði

Nú P/F Jákup á Dul hevur fingið tilsøgn frá býráðnum, so er næstan klárt at fara í gongd við arbeiði. Arbeiði er lagt til rættis, og fyrsta byggistig fer at fevna um eina stóra handilsmiðstøð og skrivstovubygningar. Annað byggistig fer at fevna um stóra ítróttarøkið, sum nú verður sett eitt lítið spurnartekin við, orsaka av at býráðið ikki vil gera bindandi avtalu í samband við ítróttarøkið. Eftir hetta fer so at vera arbeitt við íbúðum, raðhúsum, hotellum og vinnubygningum.

Ætlanin hjá P/F Jákup á Dul er at hýsa so nógvum ymiskum fyritøkum sum møguligt, so arbeiði uppi við Stórutjørn verður so fjølbroytt sum til ber.

Um byggiætlanin við Stórutjøn gerst til veruleika, so verður væntandi pláss fyri á leið 400 fleiri familjum í Havnini.

## Galathea-myndamaður sendur heim

**Myndamaðurin hjá Jyllands-Posten er sendur av skipinum, eftir at tað er komið fram, at hann hevði stolið sprutt frá yvirmonnunum, og drukkið tað umborð á skipinum, sum hevur fullkomið alkoholforboð á rannsóknarferðini**

GALATHEA
*Rólant Waag Dam*

Fyri tíð síðani var danska verjuskipið, Vædderen, í Føroyum, sum partur av rannsóknarferðini Galathea 3. Rannsóknarferðin er ein náttúruvísundalig verkætlan, og umframt serfrøðingar, granskarar og skúlanæmingar, eru eisini fjølmiðlaumboð umborð, men nú eru tey so vorðin ein færri.

Eitt danskt blað veit í morgun at siga, at myndamaðurin hjá Jyllands-Posten er sendur heim av rannsóknarferðini, heili sjey mánaðir áðrenn upprunaligaætlað. Orsøkin er hon, at myndamaðurin hevur stolið sprutt frá yvirmonnunum og síðani er tikin í at drekka tað umborð.

Sjálvandi er tað ikki loyvt at stjala, og tá tað annars er fullkomið alkoholforboð umborð, so hevur myndamaðurin forbrotið seg móti fleiri reglum, sum eru galdandi á rannsóknarferðini, og tí er hann koyrdur av skipinum.

### Rannsóknarferð ella rukkutúrur

Danska blaðið Ekstra Bladet plagar ikki at leggja fingrarnar í millum í sínum viðgerðum av málum, og tað gera teir heldur ikki í hesum førinum.

"Ein av myndamonnunum umborð á rannsóknarskipinum Vædderen, blandaði sítt uppihald á Galathea 3-rannsóknarferðini við ein rukkutúr á Oslo-leiðini", siga teir millum annað í umrøðuni av málinum. Blaðið veit eisini at siga, at myndamaðurin fjasaðist við einum 18 ára gamlum studentaskúlanæmingi umborð, og tað er heldur ikki serliga vælumtókt.

Ekstra Bladet hevur roynt at fingið viðmerkingar frá avvarðandi pørtum, hvørki Søværnets Operative Kommando ella myndamaðurin sjálvur hava hug at viðmerkja málið, men Søværnets Operative Kommando kann kortini vátta, at ein av manningini er sendur heim, og at tað er gjørt eftir boðum frá skiparanum.

# Veðrar fyri 40.000 krónur

**Teir fimm veðrarnir, sum vóru tiknir í Stakkinum leygardagin vigaðu millum 68 og 81 pund og vóru seldir fyri tilsamans 40.000 krónur**

STAKKURIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*49 fólk vóru í Stakkinum leygardagin eftir veðrum, og tey høvdu ongar trupulleikar við at fáa alt í rætt fyrstu ferð tey royndu*

*Mynd Karis á Brúgv*

Leygarmorgunin klokkan hálvgum átta vóru 49 fólk savnaði uttan fyri bygdarhúsið í Tjørnuvík. Tey skuldu út í Stakkin eftir veðrum, og sum sigur er, so sungu tey áðrenn tey fóru til gongu.

Veðrið var frálíkt og tað gekk eisini ómetaliga væl at taka veðrarnar. Allir komu í rætt í fyrstu royndini, og Høgni Hansen sum var við á túrinum heldur fyri, at tað gekk næstan ov væl.

- Allir komu í rætt beinanvegin, so tað bleiv ongantíð so spennandi sum tað onkuntíð hevur verið, sigur Høgni Hansen,

### Kingo aftur við matinum

Fólkið var aftur í Tjørnuvík beint fyri døgurða, og tá sungu tey síðsta vers av "Nú dagurin at enda er". Síðani var alt fjallfólkið boðið inn í bygdarhúsið til døgurða, og tá liðugt var at eta var eitt kingolag sungið.

### Millum 68 og 81 pund

Klokkan fimm vóru teir fimm veðrarnir seldu á uppboðssølu. Teir fóru ávíkavist 5.500, 6.000 og tveir fyri 7.000 krónur. Seinasti veðrurin varð flettur og seldur í stykkjum, og gav hann knappar 13.000 krónur inn, so samanlagt var tað hann, ið royndist best í prísi, og lá samlaða inntøkan av søluni um 40.000 krónur.

Seinni um kvøldið vórðu hinir veðrarnir flettir, og vigaðu teir ímillum 68 og 81 pund, og tað eru menn bara væl nøgdir við.

Komandi ár verða tveir veðrar og seks ær slept út í Stakkin, og so vóna tey, at kunna taka eini 14 kríatúr næsta ár.

KYKMYNDIR
Sí annars kykmyndir frá Stakkinum leygardagin á www.portal.fo